# Leggja botn til einar størri Føroyar

**Í næsta mánað fer danska stjórnin at ratifisera havrættar-konventiónina, og tað merkir, at føroyskir og danskir myndugleikar nú fara undir eitt miðvíst arbeiði at prógva, at føroyski landgrunnurin heldur fram suður eftir, og at ein partur av stóra Rockall og Hatton háslættanum er føroysk ogn**




*Anfinnur Kallsberg, løgmaður og Eyðun Elttør, oljumálaráðharri á oljuráðstevnu í Stavanger fyri nøkrum árum síðani. Stóra kortið á vegginum vísir økið sunnan fyri, sum Bretland, Írland, Føroyar og Ísland gera krav uppá. Á myndini er eisini Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni*

*Mynd Jan Müller*

MARK
*Jan Müller*

Føroyar gjørdust størri, tá vit gjørdu avtalu við bretar og íslendingar um markið. Nú er so ætlanin at tvífalda Føroyar. Talan er um rættin til stóru økini fyri sunnan uttan fyri 200 fjórðingar, sum enn eingin eigur men sum ikki færri enn fýra lond gera krav uppá, teirra millum Føroyar. Í dag fevna Føroyar um eitt knappar 300.000 ferkilometrar stórt øki. Stóra økið fyri sunnan er góðar 300.000 ferkilometrar.

Talan er ikki um nakað nýtt mál. Tað hevur verið meira og minni gongd í tí seinastu nógvu árini, men fyri okkara viðkomandi var tað lagt á hillina, tá vit raðfestu markið millum Føroyar og Bretland fremst. Nú hetta markið, markið móti Noregi og markið móti Íslandi eru komin upp á pláss liggur "bert" stóra økið fyri sunnan eftir av týdningi at fáa uppá pláss. Í sambandi við at Danmark nú fer at góðkenna havrættarsáttmálan er danska stjórnin eisini farin at fyrireika prófførsluna fyri krøv til øki uttan fyri 200 fjórðingar bæði í Grønlandi og Føroyum.

Málið hevur verið viðgjørt í landsstýrinum, og nú hevur Oljumálaráðið so sett ynski fram um at fáa góðar 5 mill. kr á eykafíggjarlóg til arbeiðið. Løgmaður er sera fegin um, at málið er komið hertil og sigur, at frá føroyskari síðu hava vit ynskt, at arbeiðsbólkurin, sum hevur við Føroyar at gera, fær føroying í leiðsluna. Og tað er játtað. Martin Heinsen, stjóri á Jarðfrøðisavninum, verður formaður.

Løgmaður sigur víðari, at tað er heilt náttúrligt, nú vit krevja formann í einum av arbeiðsbólkunum, at vit so eisini luttaka fíggjarliga í verkætlanini. Danir hava sett góðar 20 mill. kr. á fíggjarlógina til arbeiðið í ár og verður helst líknandi upphædd sett av tey komandi fimm árini. Neyvan verða nakrar kanningar gjørdar í 2003, men ætlanin er heldur at fáa eitt yvirlit allar tær kanningar, sum longu eru gjørdar. Tað skulu eisini gerast seismiskar kanningar og royndarboringar, men tær liggja nakað longur frammi.

Anfinnur Kallsberg sigur, at vit frá føroyskari síðu fara at gera okkum stóran ómak við hesum, tí hetta er eitt so stórt og týðandi mál fyri okkum. Í hesum sambandi royna vit eisini at fáa innlit í tilfar, sum aðrir hava savnað saman.

Vit hava áður gjørt okkara krav galdandi um økið sunnan fyri, men tá vit fóru undir at finna eina semju um mark millum Føroyar og Bretland valdi man eisini at hekta kravið til Rockall av, fyri ikki at órógva hitt málið. Men nú er tað so brandaktuelt at fáa tað gjørt.

### Eitt av stóru málunum

Sær løgmaður fyri sær, at føroyingar sum frálíður fara at fáa rættin til ein part av tí stóra økinum sunnanfyri!

- Ja tað geri eg. Hyggur tú at einum havkorti um okkara leiðir so sær tað út sum, at Rockall háslættin er eitt framhald av tí føroyska kontinentalsoklinum, men tað kunnu aðrir so eisini siga um síni øki. Tað eru jú dýpi ímillum. Og íslendingar gera eisini krav uppá Rockall. Írar gera tað og bretar gera tað. Men har eru nakrar djúpar rennur millum. Og hyggur tú tí náttúrliga at tí, sær tað út til at partur av økinum hoyrir til Føroyar, men tað skulu vit prógva.

Løgmaður heldur hetta vera eitt av stóru málunum hjá føroysku tjóðini í framtíðini. Talan er so eisini um eitt øki norðanfyri, sum bæði Ísland og Noreg gera krav uppá. Har er meira havdýpi, men har fara vit so eisini at royna at fáa prógv fyri, at hetta er eitt náttúrligt framhald av tí føroyska kontinentalsoklinum.

- Ein loysn, sum fer at gagna Føroyum, fer at geva okkum fleiri fyrimunir. Tað fer at geva okkum rættin til stór virði á havbotninum og í undirgrundini uttan fyri teir 200 fjórðingarnar, sum eru mark í dag. Løgmaður heldur og vónar, at vit hava eina góða sak, men tað skal gerast eitt stórt arbeiði fyri at prógva, at so er. Hann hevur stórt álit á okkara fólkum, sum nú fara undir hetta so týðandi "detektivarbeiðið".

## Fakta

Hóast flestu londini á okkara leiðum ikki ratificeraðu - t.e. formliga settu í gildi fyri teirra viðkomandi - Havrættarsáttmálan fyrr enn miðskeiðis í 90-árunum, gjørdu strandalondini kring Hatton-Rockall økið hvør í sínum lagi "designeringar" - t.e. einsæris krøv um landgrunsrættindi - út um 200 fjórðingamørkini longu miðskeiðis í 80-árunum - baseraðar á ásetingarnar í Havrættarsáttmálanum, sum varð undirskrivaður í ST í 1982.

Føroyar – men formliga er tað Danmark - er tað seinasta landið á okkara leiðum at ratificera sáttmálan. Tað verður eftir ætlan gjørt í ár, møguliga longu í næsta mánað. Ein orsøk til at henda góðkenning ikki er komin enn er m.a. eitt stríð, sum hevur verið millum Bornholm og Póland.

Designeringarnar hava ikki nakað altjóða status. Har aftur ímóti fáa øll strandalond, hvør í sínum lagi, eitt tíðarskeið - fram til 2009 ella í minsta lagi 10 ár frá tí, at tey hava ratificerað Havrættarsáttmálan - til at skjalprógva og dokumentera fyri eini sonevndari landgrunsmarkanevnd undir ST (Commission on the Limits of the Continental Shelf, CLCS), at tey hava tær neyðugu náttúrugivnu umstøðurnar - natúrligt samband ella "natural prolongation" - út eftir landgrunninum til at kunna gera formlig krøv galdandi og út um 200 fjórðingamarkið.

Ta uppgávuna hevur Jarðfrøðisavnið fingið at arbeiða við tey komandi árini - saman við øðrum viðkomandi stovnum í Danmark og Føroyum.

Hetta er tó eitt ríkismál sum so. Danska ríkið hevur fimm umráði, har hildið verður, at man skal gera seg galdandi uttan fyri 200 fjórðingar. Av teimum eru tvey í Føroyum, eitt sunnan fyri og eitt norðanfyri. Síðani trý í Grønlandi. Løgd er ein ætlan yvir 10 ár, har pengar verða settir av til at kunna prógva rættin at gera krøvini galdandi uttanfyri 200 fjórðingar.

Økini, talan kann gerast um at gera krav um, eru fyri Føroyar partvíst á Hatton-Rockall økinum í ein útsynning úr Føroyum, og partvíst í Norðurdjúpum í ein landnyrðing úr Føroyum.



# Ætla at brúka fimm ár til at finna prógvini

**Talan er um einar 350.000 ferkilometrar stórt øki, sum fýra lond og harímillum vit gera krav um. Tað er føroysk hugsan at okkara landgrunnur heldur náturliga fram suður eftir til Rockall og Hatton háslættarnar til man kemur út á djúpt vatn aftur vestan fyri Hatton og sunnan fyri Rockall/ Hatton. Maðurin, sum fer at standa fyri arbeiðinum er Martin Heinesen, stjóri á Jarðfrøðissavninum**

MARK
*Jan Müller*

Fleiri av londunum hava ratifiserað havrættar-konventiónina, og tí eru tey eisini komin longri við sínum kanningum enn vit føroyingar, nú Danmark ikki fer at ratifisera havrættarsáttmálan fyrr enn í ár.

Martin Heinesen, stjóri á Jarðfrøðissavninum, sum kemur at standa fyri tí føroyska arbeiðinum, heldur ikki, at hetta nýtist at vera ein fyrimunur fyri tey, men vit halda, at tað hevur so mikið nógv av skundi, at vit vilja arbeiða so skjótt sum tað ber til. Hann sigur, at vit ímynda okkum, at vit skulu gera hetta arbeiði ikki í einum 10 ára skeiði men nærri einum fimm ára skeiði. Danmark hevur so eisini Grønland at taka sær av, og har eru trý øki, sum eru uppá tal.

### Mest jarðfrøði

Man fer nú at kanna grundarlagið fyri, um man kann gera krøv galdandi. Grundarlagið er mest jarðfrøði og dýpi. Tað er spurningurin um "Natural prolongation" tvs. náttúrligt framhald av landøkinum. Dokumentatiónin, sum skal liggja við einum kravi, er rættiliga umfatandi, og har er rætningslinjur, sum ein landgrunnskommisión undir Havrættarkonventiónini, sum kravið skal latast til, hevur gjørt.

Í sambandi við at Danmark í fjør gjørdi av at ratifisera sáttmálan í ár so varð eisini gjørt av at fara undir kanningar. Danska stjórnin hevur tí sett pengar, umleið 20 mill. kr. um árið av á ríkisjáttanini til at gera kanningar við Føroyar og Grønland komandi fimm árini.

Ríkið hevur yvirornað sett ein kontaktbólk, "Kontaktudvalget", har ráðharrastovan fyri vísind, tøkni og menning hevur samskipandi uppgávuna, og danska játtanin liggur hjá teimum. Í hesi kontaktnevnd sita fólk frá ymsum ráðharrastovum umframt føroyingar og grønlendingar. Sigmund Isfeldt umboðar løgmansskristovuna og Herálvur Joensen, aðalstjóri oljumálaráðið.

Fyri at fáa gjørt konkretu arbeiðini eru tveir stýringsbólkar, har ein er fyri Føroyar og ein fyri Grønland. Føroyingar hava fingið formansskapin í tí eina stýringsbólkinum og verður tað Martin Heinesen, stjóri á Jarðfrøðissavninum, sum situr við borðendan. Løgmansskrivtovan hevur heitt á Jarðfrøðissavnið um at samskipa alt tað tøkniliga arbeiðið Føroya vegna. Tað verður so gjørt í tøttum samstarvi við danskar stovnar.

10 fólk eru í hesum stýringsbólkinum, seks danir og fýra føroyingar. Føroyingarnir eru Martin Heinesen og Claus Andersen frá Jarðfrøðissavninum, Hjalti í Jákupsstovu frá Fiskirannsóknarstovuni og Hans Pauli Joensen frá Náttúruvísindadeildini. Donsku umboðini eru m.a. frá farvatnsráðnum og kortráðharrastovuni.

Fyrsti stýringsbólkafundurin var í Føroyum beint fyri jól. Næsti fundurin var 28. januar í Keypmannahavn. 6. februar var næsti fundurin í kontaktbólkinum, eisini í Keypmannahavn. Á tí fundinum var allur bygnaðurin og ætlanir fyri 2003 og skitsuporjekt fyri komandi árini góðkent.

So Jarðfrøðissavnið hevur fingið eina hampuliga stóra arbeiðsuppgávu, og tað kann henda at eisini onnur koma við í arbeiðið.

Jarðfrøðissavnið arbeiðir tætt saman við Danmarks Geologiske Undersøgelser. Farvandsvæsenet hevur ábyrgd av uppmátingum og síðani kemur Kort og Martikelstyrelsen. Ætlanin er, at málsøkið, sum Farvandsvæsenet hevur og tað sum hevur við Føroyar at gera, verður flutt til Føroyar.

Av tí at okkara grannalond hava góðtikið havrættarkonventiónina fyri nógvum árum síðani og tí eru komin væl áleiðis við sínum arbeiði og tí vit hava ósvaraðar spurningar um yvirlappandi krøv so meta føroyingar,at tað hevur skund at fáa gjørt okkara arbeiði. Vit satsa tí uppá at fáa gjørt meginpartin av innsavningini í ár og næsta ár soleiðis at man kann arbeiða víðari við data og vera komin væl aleiðis eftir fimm árum sigur Martin Heinesen.

### Arbeiða eisini saman við øðrum

Tað verða gjørdar neyvar dýpdarkanningar av skapinum av havbotninum. Síðani jarðfrøðilig kortlegging, tvs. hvussu langt út basaltini røkka, hvussu tjúkk sedimentini ella legugrýtið er bæði norðan og sunnan fyri. Hvussu bygnaðurin av jarðarskorpuni er í Føroyum og allan vegin út. Her eru ymsar jarðfrøðiligar kanningar, sum vit skulu brúka til tess at dokumentera, at Føroyar og landgrunnurin halda fram við tí, sum verður kallað fyri natúrligt framhald. Og hetta skal kunna dokumenterast uppá so nógvar mátar sum møguligt. Allar upplýsingar um okkara undirgrund hava týdning. Nógvar kanningar eru longu gjørdar. Eitt nú Føroyar Rockall projektið. Tær upplýsingar vit fingu har kunnu eisini brúkast.

Hini londini og vísindaligir stovnar, oljuvinna oo. hava gjørt kanningar. Alt verður brúkt.

Hini londini, sum eisini krevja rættin til økini, hava so gjørt onkrar kanningar. Martin Heinesen sigur, at teir hava samband við tey, hóast vit kunnu gerast mótpartar. Føroyingar hava sum er samband við øll grannalondini. -Vit arbeiða saman so langt tað verður mett at vera skilagott og ráðiligt, og tað verður alla tíðina gjørt í samráð við tann politiska myndugleikan, hvat man kann og ikki. Sambannd er millum londini bæði á tekniskum og á politiskum støði vísir Martin Heinesen á.

Í Føroyum skal byggjast upp ein databasi, har yvirlit verður yvir allar gjørdar kanningar og data. Metast skal so um dygdina av tilfarinum og hvat manglar í. Martin Heinesen sigur, at man veit, hvat man skal fara eftir og roknar við, at tað verður eingin trupulleiki at seta út í kortið skilagóðar verkætlanir.

Talan er um einar 350.000 ferkilometrar stórt øki, sum fýra lond og harímillum vit gera krav um. Tað er føroysk hugsan at okkara landgrunnur heldur náturliga fram suður eftir til Rockall og Hatton háslættarnar til man kemur út á djúpt vatn aftur vestan fyri Hatton og sunnan fyri Rockall/Hatton. Tað er sjálvandi alt ov tíðliga at siga, hvussu fara vit so at standa í einum dysti við grannarnar um hetta stóra økið og harvið rættin til møgulig ráevni.

Árni Olafsson, sum er serkønur í føroyskum viðurskiftum í danska uttanríksiráðnum, og sum áður hevur havt týðandi leiklut í arbeiðinum at vinna Føroyum rættindi úti á landgrunninum, hevur eisini her eina týðandi uppgávu eitt nú í sambandi við samskifti millum londini.

Fyri at gera arbeiðið fullgott frá byrjan av verður eisini neyðugan orkan sett av. Martin Heinesen hevur søkt um og fingið farloyvi frá sínum stjórastarvi á Jarðfrøðissavninum frá 1. apríl, soleiðis at hann kann taka sær av nýggju uppgávuni burturav. Helst verður tað brúk fyri fleiri fólkum á Jarðfrøðissavninum eisini. Nú verður so sett út í kortið av álvara.



*Martin Heinesen, stjóri á Jarðfrøðissavninum, sum komandi árini burturav fer at taka sær av at finna prógv fyri, at Føroyar halda fram langt suðureftir. Her vísir hann kort av økinum, sum m.a. Føroyar gera krav uppá*

*Mynd Jens K Vang*

## Framtíðar útlit

Í desember í fjør vóru tíggju ár síðan, at Atli Dam, løgmaður, og Poul Schlúter, forsætisráðharri, skrivaðu undir avtaluna um yvirtøku av ráevnum í føroysku undirgrundini. Fáur mundi tá droyma um, at so nógv skuldi kunna fáast av skafti eftir so stuttari tíð skrivar Halgir W. Poulsen, advokatur og ein av teimum, sum hevur verið við í arbeiðinum at vinna Føroyum rættindi á undirgrund í grein í serútgávu av Sosialinum í desember í fjør. Hann skrivar eisini um økið fyri sunnan:

-Føroyskir myndugleikar hava í dag ræði á undirgrundini í einum 250,000 ferkilometra øki og kunnu uttan uppílegging skipa fyri, hvussu møgulig ráevni í hesi undirgrund skulu verða útvunnin, og hvussu peningaúrtøkan av hesum virksemi skal verða umsitin. Vit hava eitt nútímans lógarverk, bæði tá ræður um virksemið sjálvt og skatting av tí. Vit ráða fyri, nær og á hvønn hátt loyvi at leita eftir og vinna út olju verða bjóðað út, og vit ráða yvir hvør fær hesi loyvi og við hvørjum treytum. Verður talan um munandi oljuvinnu á føroyskum øki, fer tað at seta ómetalig stór krøv til myndugleikarnar, skulu samfelagsárinini ikki gerast so ógvislig, at vit verða kollrend. Ikki minst skyldurnar móti umhvørvinum og eftirkomarunum eiga at viga tungt, tá ein møgulig oljuvinna fer í gongd av álvara.

Vit eru eisini við í kappingini um eitt 350,000 ferkilometra stórt øki í ein útsynning úr Føroyum, Hatton-Rockall økið. Hendan kapping stendur millum Stórabretland, Írland, Ísland og Føroyar, sum øll kanna sær rættin til hetta økið. Hinumegin stendur Havbotnsmyndugleikin, ið sambært havrættarsáttmálanum frá 1983 skal umboða "felagsarv mannaættarinnar" (les fátækralondini og íbúgvar teirra), ið sambært sáttmálanum skulu eiga tann partin av havbotninum, ið verður til avlops, tá ríklondini hava kannað sær sítt. Hvør av hesum báðum vinnur stríðið um Hatton-Rockall økið er helst ikki ringt at gita, men hvat verður í part til Føroya, tá endaliga skal býtast, man vera meira ivingarsamt.